# “Cutting” – Gentur sum skera seg sjálvan !!!

Eftir at trupuleikarnir hækka og hareftir vaksa uppum høvdið, eru ungar gentur í tannárunum byrjaðar at skera seg sjálvan. Og er tað á slíkum støði, at talan er um eina farsótt. Tað er ikki longur bert sinnissjúk, autistiks og incestoffur, sum hava hendan atburð, men nógvar gentur í tannárunum við lágari sjálvskenslu, hava antin roynt ella halda fram at skera seg í armar og bein.

Tað kann fyri flest menniskju tykjast andstyggiligt og óskiljandi, at gentur velja hesa loysnina, tá hon ikki beinleiðis sýnist, at kunna geva nakra linna á sálarligu trupulleikunum. Heldur tvørtur ímóti; kemur nú ein kropslig byrða afturat tí sálarligu.

Men fyri ungar gentur við fløkjasligum ótta,tunglyndi, vreiði, innara tómleika, undirlutakenslum og serstakliga tvígildum kenslum, (tvs. tvær øvutbeintar kenslur, sum eru tilstaðar lið um lið og sum er tað ringasta eitt menniskja kann uppliva), er tað at skera seg sjálvan, ella brenna seg á armar og bein við sigarett, blivið ein máti at hava tamarhald á tí sálarligu pínuni, og enntá ein beinleiðis hugaligur framferðarháttur fyri summi.

Ein kann møguliga nærkast eini fatan av fyribrigdinum á tann hátt, at hesar sjálvsskaðandi gentur velja hesa kropsligu pínu, sum tær enntá hava tamarhald á, framum eina fløkjasliga og óúthaldandi sálarliga pínu. Harumframt kemur, at familja og vinir sum møguliga ikki hava lagt til merkis, tað lítið sjónligu sálarligu pínuna, heilt víst vilja reagera tá tey býta merki í skurðsárini á ørmunum. Nógv fáa tað skeivu fatan, at talan eru um sjálvmorðsroynd, men so er ikki. Sjálvsskaðandi gentur vita av royndum, hvar og hvussu djúpt tær skulu skera.

Framferðarhátturin gevur gentuni eitt “kick”, tí hon upplivir at hava tamarhald, í mótsetning til at uppliva avmakt av teimum óúthaldandi sálarligu trupulleikunum. Harumframt kemur tann linnan, sum vreiði ímóti egnum kroppi hevur við sær, og tí tað ikki er sambundið við revsing. Í øllum førið ikki í fyrstu atløgu. At tað gevur sár, arr og at tað sær ræðuligt út, er ein onnur søk, sum fyrst gevur trupulleikar seinni.

Ímeðan “Cutting” áður bert fanst sum eitt heilt óvanligt sjúkueyðkenni, finst tað nú sum eitt mótafyribrigdi ella yndiseyðkenni ímillum ung, og tískil á ymiskum stigi.

Teir ógvusligu tilburðirnir bera eyðkenni av, at teir sálarligu skelkirnir liggja áðrenn búningina av burturskotranarverjuni (fortrængnings forsvaret), av tí hava tvígildar og fløkjasligar sálarligar líðingar, gjørt tað neyðugt við einum framferðarhátti, sum kann rúma tí sálarligu orkuna, sum er knýtt at trupulleikunum. Tá sjálvskenslan ikki er nóg mikið búna, og tá gentan javnt og samt er bundin av váttan uttanífrá fyri at kunna varðveita sjálvskensluna, vil tað at skera seg í armin blíva meira skynsamt og skiljandi, av tí grund at onnur alt fyri eitt reagera við ræðslu, hjálp, samkenslu, innleggjan og ringari samvitsku, um man er foreldur o.s.fr.

Við hesum framferðarhátti fær gentan eisini:

- *Tamarhald á pínuni.*
- *Tamarhald á øðrum.*
- *Kemur i miðdepilin av hendingunum, og fær tað neyðuga uppmerksemi til at varðveita sítt sjálvsvirði.*
- *Fær flutt fokus frá sálarligari pínu til  kropsliga pínu.*
- *Sleppur frá øðini uttan at tað er tilhoyrandi revsing.*
- *Fær nøkta bæði sadistiska og masokistiska lyndi í eini og somu gerð.*
- *Harumframt kemur ein lívvirkislig reaktión, grunda á pínuna og leysgivnar endofinur, tað vil siga narkotisk virkandi evnir, sum kroppurin sjálvur gevur frá sær, og sum er við til at fasthalda tað sjálvsskaðandi gentuna í vandamálinum.*

Viðgerðin má í fyrsta umfarið miðja ímóti, at loysa upp fyri átrokandi trupulleikum uttanífrá, sum kunnu hava verði við til at útloysa tann sjálvsskaðandi framferðarháttin, (tað kann vera trupulleikar í familjuni, í nærumhvørvinum o.s.fr) harnæst kann arbeiðast við ymiskari terapi.

Viðgerðartíðin er at meta sum long.

Tøl frá Danmark vísa at tvær ferðir so nógvar gentur sum dreingir eru bundnar at hesum framferðarhátti.

*Keldur: Netpsych og LMSnyt*